## DAGSINS MEINING

# Fótbólts-EM - ein gysari

Mangir eru teir føroyingar, sum í hesum døgum sita sum trælabundnir til sjónvarpssíggjan. Um teir vilja tað ella ikki. Um teir eru fótbóltsfreaker ella ikki. Ringt er at koma uttan um skíggjan, ið hevur víst EM fótbólt uttan íhald og fer at halda fram við tí komandi dagarnar eisini. Gott tað sama, tí hetta er undirhald, tá tað er best. Ynskir tú spenning og action er einki sum ein javnur, spennandi, skjótur og vælspældur dystur millum heimsins bestu fótbóltstjóðir. Her fær tú alt í einum cocktaili: spenning, eitt listarligt upplivilsi fyri ikki at tosa um innastu kensluna av tjóðskapi.

Hetta fingu vit ikki minst at sanna hóskvøldið, tá eitt slag av David og Goliath hólmgongu varð á skíggjanum. Føðiland fótbóltsins Ongland og nýggja stjørnan á fótbóltshimmalinum Portugal brustu saman í einum gysara av einum fótbóltsdysti, har tú eina løtu tók synd í gullrandaðu bretsku spælarunum fyri síðani ta næstu løtuna at halda við "the underdogs" úr pinkulandinum Portugal, tá teir stóu andlit til andlit við kempuna Goliath.

Hvør Hanus og Janus í landinum kennir úrslitið av hesum fyrsta kvartfinaludystinum í EM-kappingini í Portugal. Ein lemjandi ósigur til Ongland, tá hugsað verður um stødd, traditión og dygd. Høgtvirdi og ikonlíknandi Beckham gjørdi eitt persónligt sjálvmál, so tað stóð eftir, tá hann brendi brotsspark og var tað annað brotssparkið hann brendi í kappingini. "Højt at flyve dybt at falde" er eftirmæli hansara í hesi stund. Fáa staðni kanst tú koma so høgt á tindarnar og so bráddliga fella so djúpt sum í fótbólti. Kappingin hevur so ikki bara fingið ein bráan enda fyri Ongland. Eisini frægar fótbóltstjóðir sum Týskaland, Spania og Italia hava lagt kongin.

Hetta særir kenslurnar hjá mongu milliónum av fótbóltsfjepparum men fyri tað er dómadagur ikki komin. Hóast "títt/mítt" land hevur tapt, so fara sjarmerandi og vælspælandi "underdogs" fótbóltstjóðirnar sum Danmark, Svøríki, Tjekkia og nú eisini Portugal at gera fótbóltsupplivingina til nakað enn størri, eisini tí her er talan um liðavrik og í minni mun nærum avgudadyrkan av monnum sum Beckham, Raul, Totti og Ballack. Vit fara tó framvegis at síggja einstaklinga fóltbóltskynstur á vølli, nú spælarar sum Ronaldo, Larsson, Thomasson og Nedved fara at leggja alt teir eiga í spælið.

Men vit eiga so heldur ikki at gloyma, at fótbóltstjóðin yvir øllum fótbóltstjóðum seinastu árini, Frakland framvegis er við í kappingini. Hóast vit fegin síggja ein nýggjan EM-vinnara so sum Portugal, Tjekkia, Danmark ella Svøríki, so sleppa vit ikki uttan um fronsku virtuosarnar. Liðið, sum bæði hevur vunnið HM og EM og sum nú skal verja sítt EM-heiti. Fyri føroyska áskoðaran kann tað vera áhugavert at síggja Frakland aftur at vinnarapallinum, tí hetta er tjóðin vit skulu spæla ímóti í HM-undankappingini. At fáa vitjan av einum nýbakaðum EM-vinnara er ikki at kimsa at. Tað vil gera fótbóltsupplivingina so mikið størri, men tað kann eisini gera tapið tað størri. Tí seta kanska mong av okkum sítt álit á nettupp eitt av teimum undirtippaðu londunum, ið vit hava umrøtt her. Mong megu hava norðurlendsku grannar okkara sum favorittar, og ein finala millum Danmark og Svøríki, hevði verið kærkomin.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Fiskivinnan og framtíðin

**Johan Dahl,**
**løgtingsmaður**



Lógin um Vinnuligan fiskiskap og fiskidagaskipanin eru báðar væleydnaðar skipanir, sum eru settar í verk av sambandssamgonguni 1994-1998, men einhvør skipan má tillagast, so hon til einahvørja tíð er ajourførd, tí annars virkar hon neyvan eftir ætlanini – og soleiðis er eisini við hesum skipanum.

Tað er ein sera stór ábyrgd at umsita fiskivinnuna, tí hon er grundarlagið undir samfelagnum.

Grundarlagið undir okkara áhaldandi vælferð _ men tað er hon einans, um hon verður umsitin við neyðugum fyrilitum fyri allari vinnuni bæði á sjógvið og landi.

Við núverandi gongd við støðugt ringum prísum og víkjandi marknaði, eru útlitini fyri framman alt annað enn bjørt og mugu vit gera upp við okkum sjálvi, um vit áhaldandi vilja hava eina fiskivinnu á landi ella vit áhaldandi skulu lata meir enn helmingin av tilfeingi okkara fara óvirkað av landinum.

Tað má verða fair play, og føroyska vinnan á landi má hava somu kappingarparametur at bjóða út frá, sum útlendsku keypararnir, annars verður trupult at virka í hesum landinum.

Skulu vit t. d framleiða alt á landi, ella skulu vit loyva partvísari framleiðslu umborð á skipum?

Skal øll fyrstahonds søla verða yvir uppboðssølu í Føroyum og yvir føroyskan kaikant??

Ella skal tað stórt sæð verða frítt slag?

Møguleikarnir eru fleiri, men tann loysnin, sum ger øll nøgd, finnst neyvan, og neyðugt verður neyðugt at skera ígjøgnum.

Hvat tænir vinnuni best, og hvat tænir føroyska samfelagnum best sum heild??

Greinin hjá Jens Josefsen, nevndarlimi í Fiskavirking, sum viðger hendan trupulleikan í bløðunum 24.06.2004, er áhugaverd og eigur at geva okkum nakað at hugsa um, hann viðger nøkur ting ,sum eru sera relevant og neyðug at taka upp til viðgerðar.

Sjálvandi skulu marknaðarmekanismurnar stýra gongdini í so stóran mun sum til ber, men tað ber ikki til at sita og hyggja at, meðan føroysku framleiðsluvirkini á landi eru við at fara í skeljasor, og arbeiðsloysið veksur dag fyri dag, meðan stórur partur av okkara tilfeingið verður selt óvirkað uttanlands _ tá haldi eg, at alarmklokkurnar eiga at ringja.

Vit kunnu eisni gera sum búskaparfrøðingar mælað til, nevniliga:

– at lata fara tað, ið ikki kann klára seg, - ella

– at minka um útflutningsframleiðsluna (sí sitat hjá H. Oskarsson niðanfyri) og so síggja hvat hendir innan tað næsta árið, men stóri spurningum er, um tað er forsvarligt bara at lata standa til??

Herman Oskarson segði m. a niðanfyri siteraða - sum eg loyvi mær at endurgeva úr hansara framløgu á Christiansborg um blokkin

Citat:

• Den politiske linje de sidste 6 år har været at mindske bloktilskuddet og øge eksportproduktionen uden subsidier

• den nye politiske linje er ikke lagt endnu, men kan kun være en af disse

– enten mindre eksportproduktion og bevaret bloktilskud

– eller en ny krise . . .

citat endað.

Hetta má eg siga ljóðar ikki sørt ørkymlandi _ men kanska onkur í Búskaparráðnum, sum jú tekur fult undir við hesum sjónarmiði, kann siga okkum, um hetta er veruliga gongdin vit skulu ganga í framtíðini??

Annars tá vit tosað um búskaparliga partin av tí, sum m. a. tilmælunum frá fiskifrøðingum og fiskidaganevndini, so er spell at hesin ikki er við í størri mun, tað kundi verið áhugavert at sæð teirra niðurstøður.

Tað er upp á hægstu tíð at vit fara í holt við at finna loysnir fyri, hvussu fiskivinnan og fiskaframleiðslan skal skipast framyvir, so at optimal gagnnýtsla kann fáast fyri skip og virkir og gerst hetta einans við at lurta eftir og samstarva við vinnuna á sjógvi og landi og serfrøðina um loysnir .

• Lógin um vinnuliga fiskiskap er upprunaliga vælegnað til føroysk viðurskifti, men hon má uppdaterast/tillagast. og smávingarsteinar burturbeinast.

• Vit mangla teirri leypandi tillagina av fiskidagaskipanini t. d. bólk 5 og veiðitrýstið má regulerast

• Vit mangla at gera eina nýggja skipan fyri okkara flota, sum veiðir á fjarleiðum og seta hendan í føraraposition ístaðin fyri taparastøðu

• Vit mangla at finnað nýggjar møguleikar og fiskirættindi og fáa fatur á kvotum frá ørðum londum sum vit síðani t. d. kunnu skipað í ein kvotabanka, at nýta til okkara egna skipflota.

• Vit mangla ein langsiktaðan fiskivinnupolitikk snøgt sagt!!

Um vit ikki skjótast gera neyðugar tillagingar og langtíðarstrategiir fyri fiskivinnuna, komað vit at sagað greinina av vit sita á.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Páll Holm Johannesen pall@sosialurin.fo
Heini í Skorini heini@sosialurin.fo
Rúna Sivertsen runa@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
Hans Kárason Mikkelsen hans@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 228909
e-post: vilmund@sosialurin.fo

**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin

**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801

**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn

**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]



**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
| --- | --- | --- | --- | --- |
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




## VIÐMERKINGAR

# Studningur, Blokkurin og Búskaparráðið

**Tað er eftir hondini vorðin almenn fatan, at búskaparfrøðin og allir búskaparfrøðingar eru samdir um, at allur studningur er av tí ónda - hetta óansæð um talan er um studning til vinnu ella blokkstuðul. Hetta er tó ikki veruleikin, hóast Búskaparráðið ferð eftir ferð roynir at staðfesta hetta sum veruleika**

MAGNI LAKSÁFOSS



Studningur er bæði væl og gjølla viðgjørdur í búskaparfrøðini. Til tíðir verður ávíst hvørjar ringar avleiðingar studningur kann hava á avgerðirnar tiknar av virkum, einstaklingum og tí almenna og hvussu man við at avtaka studningin kann rætta upp á skeivleikar. Aðra tíðir verður víst á hvussu studningur kann bøta um skeivleikar og virka til frama fyri eini betri gagnnýtan av tilfonginum.

Studningur er sostatt als ikki altíð av tí ónda, men kann - um rætt verður borið at - eisini virka til frama fyri einum betri innrættan av samfelagnum. Einasta treyt er, at tey sum innrætta og umsita studningin hava skil fyri tí tey gera.

### Studningur og avgjøld

Studningur kann sammetast við avgjøld - bert við øvugtum fortekni. Bæði studningur og avgjøld kunnu nýtast av tí almenna til at stýra avgerðum hjá virkum og fólki.

T.d. kunnu vit hugsa okkum at vit í Føroyum ynskja okkum at SEV skal minka um dieselnýtsluna og heldur økja um vindorkuna. Ein háttur at fáa SEV at gera sum vit ynskja er, at seta eitt avgjald á diesel meðan vit lata studning til vindmyllur. SEV hevði heilt náttúrligt roynt at tillaga sína framleiðslu til broytta kostnaðin, og hevði tískil minka um tað dýru dieselframleiðsluna og útbygt bíligu vindmylluorkuna.

Á henda hátt kann studningur nýtast sum eitt gagnligt amboð til at fremja nøkur almenn áhugamál. Sostatt er studningur eitt amboð á jøvnum føti við avgjøld, skatt, toll, MVG, punktgjøld og onnur stýringsamboð hjá tí almenna.

### Írland

Studningur hevur havt ein avgerandi leiklut í tí ovurhondsstóra búskaparvøkstri sum Írland hevur upplivað seinastu mongu árini.

Írland hevur vanliga verið eitt heldur aftarlaga land - búskaparliga sæð. Nógv fólk fluttu úr Írlandi til onnur lond, serliga USA og Ongland, tí útlitini vóru so vánalig í Írlandi. Hetta hevur ført til sera stórar inntøkuflytingar úr ES-grunnum fyri at menna økið. Inntøkuflytingarnar, saman við einum ógvuliga aggresivum vinnuframapolitikki, hava ført við sær, at Írland hevur havt ein árligan búskaparvøkstur omanfyri 7% seinastu 10 árini, sum er óhoyrt í Europa í dag.

Fólkaflytingarnar úr Írlandi er tískil í dag vendar til innflyting av arbeiðsmegi.

Í dag hevur landið sostatt ment seg so mikið, at inntøkuflytingarnar úr ES eru minkaðar, men vøksturin í Írlandi er enn høgur, m.a. orsakað av lagaligum skattaviðurskiftum til vinnuvirki og málrættaðum vinnupolitikki.

### Orsakir til vøkstur

Vanliga verður sagt, at fýra grundleggjandi orsøkir eru til stóra Írska búskaparvøksturin:

1. Ein góður og málrættaður fíggjar- og kappingarførispolitikkur
2. Umfatandi stuðul frá ES strukturgrunnum
3. Nógvar multinationalar fyritøkur eru fluttar til Írland orsaka av einum sera vinnuvinarligum skattapolitikki og lágum lønarlagi
4. Góð og vælútbúgvin arbeiðsmegi

Smbrt. pkt. 2 hevur ein studningur frá ES til Írland (ikki ólíkur blokkstudninginum) verið ein av avgerandi fortreytunum fyri stóra búskaparvøkstrinum. Stórur partur av inntøkuflytingunum er farin til gransking og menning.

Smbrt. pkt. 3 hevur beinleiðis vinnustudningur (ein sera lagaligur skattapolitikkur) eisini verið ein av hornasteinunum undir stóra vøkstrinum.

Samanlagt er eingin ivi um, at ein væl tilrættalagdur studningur kann vera sera gagnligur fyri vinnulívið, búskaparvøksturin og samfelagið.

### Búskaparráðið

Hví letur Búskaparráðið so øll fáa eina fatan av at studningur altíð er av tí ónda? Hetta hevur serliga verið sagt av formanninum í Búskaparráðnum, men hann er einans talirørið fyri alt ráðið, so lítil ivi man vera um, at hetta er fatanin hjá øllum ráðnum.

Hesin pástandur hevur verið endurtikin ferð eftir ferð av Búskaparráðnum. Seinast er hann endurtikin á ráðstevnuni á Chritiansborg.

Um so er, at búskaparfrøðin altíð helt at studningur og inntøkuflytingar eru av tí ónda, hevði ES neyvan havt áhuga í at flutt stórar upphæddir til t.d. Írland. Og um so er at studningur veruliga er óndur, so hevði Írland als ikki fingið búskaparvøksur av flytingunum, men heldur sovnað og doyð burtur.

### Blokkstuðulin

Blokkstuðulin er ein veiting, eitt slag av studningi, frá einum parti av ríkinum til annan part, og kemur hann beineiðis inn í landskassan - ájavnt við tað sum kemur inn gjøgnum skatt og avgjøld. Spurningurin um blokkstuðulin er skaðiligur ella gagnligur er ikki ein spurningur hvaðan hann kemur, men einans ein spurningur um hvussu hann verður nýttur.

Um vit velja at nýta okkara pening til økir sum kunnu skapa búskaparvøkstur, vil hetta sjálvandi hava gagnlig árin á okkara samfelag.

Í sera stóran mun er blokkstuðulin farin til at menna og útbyggja okkara samfelag. Saman við inntøkum sum vit sjálvi hava skapt, hava vit í dag fingið eitt framkomið samfelag við vælútbygdum infrastrukturi og góðum og vælvirkandi almennum sektori.

### Umsita rætt

Eftir mínum tykki eiga vit ikki at ræðast studning og blokkstuðul, men eiga heldur at læra okkum at umsita alt tilfongið rætt - óansæð um tilfongið er komið úr havinum ella tað er komið av Flatlondum.

Gamla fiskivinnusamfelagið hevur tørv á ávísum tænastum fyri at virka væl, t.d. góð havnaløg, góðar flutningsmøguleikar bæði inni í og av landinum, bíliga orku og onnur líknandi viðurskifti. Flestu av hesum fortreytum eru til staðar í dag, m.a. takkað Ríkisveitingini.

Komandi háteknologiska fiskivinnusamfelagið og vitanarsamfelagið hevur tørv á øðrum "infrastrukturi", nevniliga vitan og gransking.

### Granking og menning

Vit eiga tí at koma burtur frá gomlu vanahugsanini um at bert vit fáa ein nýggjan tunnil ella eina nýggja ferju so er alt gott. Sjálvandi skal infrastrukturin støðugt mennast og útbyggjast, men vit eiga at leggja størsta dentin á hugsjónir innan framtíðar vinnuna, og leggja minni dent á gamlar og farandi vinnur.

T.d. vildi ein væl útbygdur menningardepil innan fiskivinnuna kunna ment og styrkt fiskivinnuna, flakavinnuna, havbúnaðin og biotøknologisku vinnuna, soleiðis at hesar vinnur eisini í framtíðini kunnu vera eitt munagott íkast til búskapin. Um vit onki gera og bara lata standa til, vilja vit enda í somu støðu sum Írland innan ES-studningin, nevnliga sum búskaparligur eftirbátur, har fólkið flytur til onnur og betri økir at liva og starvast.

### Skeivt fokus

Samanumtikið kann sigast, at við einans at fokusera uppá tær ringu avleiðingarnar av studningi og Ríkisveitingum, hevur Búskaparráðið, og serliga formaðurin í ráðnum, givið føroyingum eina skeiva mynd av veruleikanum.

Hvat enn verri er, hevur tann einsíðuga viðgerðin av Ríkisveitingini eisini eitt skeivt fokus, soleiðis at politikkarnir fáa eina fatan av at tað einans ræður um at fáa Ríkisveitingina burtur, so er alt gott.

Eitt munandi betri fokus hevði verið at havt eina gjølliga gjøgnumgongd av hvussu framtíðar Føroyar kann koma at síggja út, og hvussu tað almenna skal gera fyri at skapa størst møguliga menning og vøkstur. Tí við vøkstrinum fylgja eisini inntøkur til tað almenna, sum hevði givið okkum nakað at sett í staðin fyri Ríkisveitingina - tá hevði einki verið meiri náttúrligt enn at minka um veitingarnar úr Danmark.

# Samráðingar: Ja - Buldur og brak: Nei

**Kaj Leo Johannesen**
*Sambandsflokkurin*



Eftir tríggjar fundir, sum Bárður Nielsen, landsstýrismaður, í hesi vikuni hevði við Bendt Bendtsen, búskaparmálaráðharra, Thor Petersen, fíggjarmálaráðharra og Bodil Nyboe Andersen, tjóðbankastjóra, er greitt, at Landsstýrið fær sama innlit í føroysk peningastovns- og fíggjarviðurskifti, sum danskir myndugleikar í dag fáa frá Fíggjareftirlitinum. Talan er um eitt gamalt ynski frá føroyskari síðu, sum nú verður eftirlíkað.

Í oktober í fjør boðaði táverandi landsstýri frá, at ætlanin var at yvirtaka alt fíggjarøkið longu á ólavsøku í ár. Yvirtøkan skuldi millum annað umfata fíggjareftirlitið.

Um ætlanin hjá undanfarna landsstýri hevði verið sett í verk, so høvdu vit um ein mánað fingið eitt serføroyskt fíggjareftirlit, hvørs einasta eftirlitsuppgáva var at halda eyguni eftir einum banka og trimum sparikassum. Hetta hevði neyvan givið starvsfólkunum á stovninum ta venjing, sum starvsfólk á fíggjareftirlitum í størri londum hava, og neyðugt hevði eisini verið at keypt dýran serkunnleika uttan fyri landoddarnar. Ivasamt er eisini, um trúvirðið hjá einum føroyskum fíggjareftirliti uttanlands hevði verið eins stórt og trúvirðið, hjá danska fíggjareftirlitinum. Afturat hesum høvdu peningastovnar í Føroyum helst eisini verið noyddir at latið seg virðismeta hjá kredittmetingarstovnum uttanlands, og tað hevði kosta teimum nógvan pening, sum kundarnir høvdu verið noyddir at goldið fyri.

Umframt fíggjareftirlitið, hevði í sambandi við eina yvirtøku av fíggjarøkinum, eisini verið neyðugt at stovnsett ein innskjótaratrygdargrunn. Tá undanfarni landsstýrismaðurin í fíggjarmálum í november bleiv spurdur, um 30 mió. krónur var nóg mikið at seta í ein slíkan grunn svaraði hann, at tað talið skuldi faldast nógvar ferðir, áðrenn upphæddin var hóskandi.

Men øllum hesum útreiðslunum og vansunum sleppa vit nú undan, tí yvirtøka av fíggjarøkinum stendur ikki í samgonguskjalinum hjá nýggju landsstýrissamgonguni.

Vit kunnu tí ikki annað enn fegnast um avtaluna, sum Bárður Nielsen, landsstýrismaður, hevur gjørt við donsku stjórnina, tí við henni fáa vit allar fyrimunirnar, sum vit kundu fingið við at yvirtikið fíggjareftirlitið, og harafturat sleppa vit undan vansunum.

Hetta er enn eitt dømi um, at størstu fyrimunirnar fáa vit við at samstarva, og ikki við at skapa øsing.

# Óhóskandi handilslýsing

**Gissur Patursson**



Tað hevur altið argað og irriterað meg at ein ávís fyritøka lýsir upp undur okkara tjóðarhátíð við einum ávísum málingablikki (enntá framleitt í útlandinum) og scenan ella høðusscenan er talarapallur okkara á óavsøku og áhoyraranir eru vit øll Føroya fólk á Vaglinum á Ólavsøku, og her meini eg, at tað ALS ikki eigur at finna stað at vit/handilsfólk/fyritøkur nýta okkara tjóðarhátíð og okkara MERKI og TJÓÐBÚNAN (føroysk klæði) á hendan hátt; og vil eg heita á fyritøkuna um at ummhugsa at taka hesa lýsing burtur og royna okkurt meiri kreativt, ið ikki irriterar millum annað meg og nógv onnur.... men skal einisi ásanna, at vit her í Føroyum mangla ein marknaðarføringarpolitikk, ið mær vitandi hevur verið á veg í alt ov nóv ár.

Skal eisini heilsa og siga, at tað ber til at gera góðar handilslýsingar, har ólavsøkan og Merkið er við upp á ein sigandi og siðiligan hátt; tað hava lýsingarstovurnar víst; men vit handilsfólk mugu og skulu hava ein høgan sjálvkritikk, innan vit seta slíkt út í verkið.